Peter Duelund, mentanarserfrøðingur:

# Stuðlið skaparunum beinleiðis

**– Tað er umráðandi at stuðla teimum skapandi listafólkunum, tí tað eru tey, sum skapa innihaldið í mentanarlívinum, sigur Peter Duelund mentanarsosiologur frá Københavns Universitet, sum er í Føroyum í sambandi við mentanarpolitiska ráðstevnu í Norðurlandahúsinum**

MENTANARPOLITIKKUR
*Stefan í Skorini*



*Peter Duelund hevur saman við einum hópi av øðrum granskarum gjørt eina heildarmynd av norðurlendskum mentanarpolitikki*

*MYND: Jens Kr. Vang*

Hann vísir á, at samlaði stuðulin, sum fer beinleiðis til tey skapandu listafólkini í Norðurlondum, er millum 5 og 7 prosent av samlaðu játtanini til mentanarøkið. Restin av játtanini fer til umsiting, tryggjan av karmunum og teknologi av ymsum slag.

Peter Duelund vísir á, at politikarar eiga at leggja størri dent á at stuðla listafólkum, sum skapa innihaldið í øllum mentanarlívi. Um tey ikki fáa góðar sømdir og umstøður at skapa sína list, fer mentanarlívinum at vanta veruligt innihald.

Um vikuskiftið verður stór ráðstevna í Norðurlandahúsinum um mentanarpolitikk. Við á ráðstevnuni er Peter Duelund, sum saman við seksti øðrum granskarum júst er liðugur við eina risastóra verkætlan um norðurlendskan mentanarpolitikk. Hann greiddi á tíðindafundi fríggjamorgunin frá nøkrum av teimum niðurstøðum og eygleiðingum, hansara granskingarlið er komið fram til.

Tað er Norðurlendski Mentanargrunnurin, sum saman við mentamálaráðunum í Norðurlondum, ið fíggjar verkætlanina.

Ætlanin við verkætlanini er at gera eina heildarmynd av norðurlendskum mentanarpolitikki síðan seinna heimsbardaga, og kanska serliga síðan 1960, tá tey flestu londini fóru undir at orða ein greiðan mentanarpolitikk.

### Mentan skal einki kosta

Í sambandi við hesa verkætlan hevur Jette Forchammer sett saman eina bók um føroyskan mentanarpolitikk, og henda bókin lýsir, hvørjar trupulleikar mentanarlívið í Føroyum hevur at dragast við. Tað eru føroysk listafólk og mentanaráhugað, ið hava skrivað innleggini í bókini.

Í samandráttinum nevnir hon fleiri viðurskifti, sum forða menningini av mentanarlívinum her á landi. Ein tann størsti trupulleikin er, at landsins politikarar ikki skilja, at mentan og list kostar pening. Tað er neyðugt í størri mun og meira miðvíst at stuðla føroyskum listafólki í teirra arbeiði.

Eisini verður víst á, at íbúgvatalið í Føroyum setir mark fyri talinum av áhoyrarum og áskoðarum. Føroyar er framvegis tætt knýtt at Danmark á mentanarliga økinum, og hetta er ein trupulleiki, metir Jette Forchammer.

Eisini er tað ein trupulleiki, at møguleikarnir hjá føroyskum listafólki at nema útbúgving í Føroyum eru sera avmarkaðir, og tað hevur við sær, at føroysk listafólk leita sær av landinum í útbúgvingarørindum.

Peter Duelund vísir eisini á, at vinnulívið í Føroyum ikki hevur verið serliga áhugað í at stuðla føroyskum mentanarlívi, og tað er neyðugt at fáa vinnulívið meira við í mentanarlívið her á landi.

Kanningarnar hjá granskarunum vísir tó eisini, at norðurlendingar luttaka nógv meira í mentanarlívinum samanborið við londini í Suðurevropa.

# Vítt um verøld




*Summarframsýningin hjá Landsbókasavninum, sum nevnist Vítt um verøld, er opin alt summarið*

**Í summar skipar Føroya Landsbókasavn fyri framsýningum av føroyskum frásagnum frá ferðum í útlondum**

FRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*

Hetta eru frásagnir, sum hava staðið í tíðarritum og bløðum, ella sum eru komnar út í bók. Framsýningin læt upp fyri almenninginum hóskvøldið klokkan 20 við lítlari samkomu á Landsbókasavninum. Turið Sigurðardóttir og Heini Olsen at hugleiddu um ferðir og ferðing, og aftaná verður so høvi at síggja framsýningina.

Á framsýningini sæst at væl er til av ferðafrásagnum, sum føroysk ferðandi hava skrivað. Talan er um bæði styttri frásagnir og um heilar bøkur. Og hesi fólk hava ferðast víða. Føroyingar hittast sanniliga allastaðni.

# Karsten ikki tikið støðu enn

**Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur enn ikki tikið støðu til, um hann fer at góðkenna nýggja sáttmálan, sum SEV og Maskinmeistarafelagið eru komin ásamt um**

SEV
*Stefan í Skorini*

SEV og Maskinmeistarafelagið eru komin ásamt um at gera eitt ískoyti til tann upprunaliga sáttmálan, sum Karsten Hansen ikki vil góðkenna.

Fríggjamorgunin fekk landsstýrismaðurin avrit av einum brævi, sum SEV hevur sent Maskinmeistarafelagnum. Í brævinum verður greitt frá, hvat semjan millum SEV og Maskinmeistarafelagið snýr seg um.

Karsten Hansen hevði fríggjadagin á middegi ikki tikið støðu til, um hann fór at góðkenna hetta uppskotið.



*Karsten Hansen hevur enn ikki tikið støðu til, um hann fer at góðkenna nýggjasta uppskotið til ein sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið*

### Sami sáttmáli

SEV og Maskinmeistarafelagið eru komin ásamt um at gera eitt ískoyti til tann vrakaða tvey ára sáttmálan, soleiðis at sáttmálin verður longdur við einum ári, har lønarhækkingin ikki verður eins høg sum hini bæði árini.

Karsten Hansen vísir á, at hetta í veruleikanum er tann sami sáttmálin, sum hann vrakaði á sinni.

– Tað síðsta árið av sáttmálanum broytir ikki tvey tey fyrstu, sigur Karsten Hansen, sum ikki ljóðar serliga heitur fyri hesum nýggjasta uppskotinum, men hann leggur dent á, at enn hevur hann ikki tikið støðu til, hvussu hann skal fyrihalda seg til nýggja sáttmálan.

Maskinmeistarafelagið hevur gjørt púra greitt, at tað heldur rimmarfast við tann tvey ára sáttmálan, hóast landsstýrismaðurin hevur vrakað hann.

Spurdur um hann kennir seg trýstan av hóttanini frá maskinmeistarunum at leggja arbeiði niður, svarar Karsten, at hetta sjálvandi er við í hansara metingum, men hann vísir samstundis á, at talan ikki er um nakað sjálvtøkuborð av sáttmálum.



# Føroya Fiskasøla: Nú sær rættiliga svart út

**– Tað gongst ómetaliga illa at sleppa av við fisk tí marknaðurin er í botni og tað er ringt at síggja nakrar glottar fyri framman, sigur Árni Arge, stjóri á Føroya Fiskasølu**

MARKNAÐARÚTLIT
*Áki Bertholdsen*



*– Í løtuni er ikki nógv sum bendir á, at tað fer at batna, sigur Árni Arge, stjóri á Føroya Fiskasølu*

– Tað sær rættiliga svart út. Og tað er onki, sum bendir á, at tað verður frægari.

Árni Arge, stjóri í Føroya Fiskasølu, er samdur við teimum, sum lata sera illa at marknaðinum fyri fiski í teimum londum, sum vit plaga at selja til.

Hann sigur, at tíðirnar eru farnar at versna í keyparalondunum og tað er við til at trýsta prísirnar niðureftir.

– Sostatt kundi verkfallið ikki rakt meinari enn tað gjørdi beint nú, sigur fiskasølustjórin.

Hann sigur, at eftir verkfallið er Fiskasølan tí komin í eina støðu, har alt skal byggjast uppaftur.

– Og tað kann vísa seg at gerast eitt tógvið stríð, sum kemur omaná tað, at marknaðurin er vánaligur frammanundan.

Stjórin á Fiskasøluni sigur, at tá ið marknaðurin er so vánaligur, sum hann er í løtuni, kann tað vera trupult at fáa viðskiftafólkini til at taka tær vørur, sum tey hava bundið seg til at taka, tí eins og vit hava trupulleikar at selja fisk, hava teir eisini trupulleikar at sleppa av aftur við fiskin longri niðri í marknaðinum.

– Tá ið vit so ikki fáa leverað í ein heilan mánað av tí at verkfall hevur verið, hava viðskiftafólkini eina gylta umbering at sleppa av við okkum og at siga, at teir fara aðrar vegir.

– At vit ikki hava kunnað levera til tíðina, taka fiskakeyparar ógvuliga nær og nú, verkfallið hevur verið, hava teir verið noyddur at finna aðrar seljarar til tað, teir hava brúk fyri.

– Um teir so koma aftur til okkum, fer bara tíðin at vísa, men tá ið vit hava verið av marknaðinum í fýra vikur, er tað ógvuliga trupult at koma upp í part aftur, serliga nú hann er so vánaligur.

### Vánaligt yvir ein kamb

Árni Arge vísir á, at fiskasølan selir nógv til handilsketur og tær eru ómetaliga tungar at arbeiða við.

– Tað kann taka eitt hálvt ár bara at fáa fund í lag við teir upp á eitt korter ella tjúgu minuttir og tí er tað so ómetaliga tungt at samstarva við teir.

– Men hava vit so avtalu í lag um at levera ávísar nøgdir, er prísurin fastur og so verður ikki tosað meiri um prís.

Hann sigur, at hvat langtíðaravtalum viðvíkur, hevur Fiskasølan so dánt klárað sínar skyldur, tí hon syrgdi fyri at hava fisk á goymslu uppundir verkfallið.

– Men í einum føri hevur tað ikki eydnast.

Hann vísur eisini á, at Fiskasølan hevur virki í Danmark og tað hjálpir avgjørt upp á støðuna.

Men langtíðaravtalurnar eru bara ein partur av virkseminum hjá fiskasøluni.

– Hvat viðvíkur stutttíðar avtalunum, vit hava um at levera til matstovur o.s.fr., hava við svikið mangt eitt viðskiftafólk, sum Árni Arge tekur til.

– Tað er nógv, sum er farið í spønir í verkfallinum og tær sølur, sum eru mistar, fáast í hvussu so er ikki aftur.

Hann sigur, at marknaðurin kann býtast sundur í trý høvuðsøki, rækjur, alifisk og botnfisk.

– Rækjurnar hava vit hoyrt nógv um, men har er marknaðurin heilt illa fyri og tað er lítíð sum bendir á, at vit fara at síggja munandi prísbroytingar í næstu framtíð.

Tó er Árni Arge eitt lítið sindur bjartskygdur um pilkaðar rækjur, tí hann hevur eina lítla vón um, at tann prísurin fer at hækka eitt lítið sindur.

– Hinvegin hevur prísurin á laksi verið lágur leingi. Nú er hann so komin heilt niður á einar 17 krónur fyri kilo og tað er langt undir framleiðsluprísin.

Stjórin á Fiskasøluni sigur, at eisini, hvat botnfiski viðvíkur, eru prísirnir lágir í løtuni og hann væntar, at teir fara at fella enn meiri.

### Útlitini vánalig

Árni Arge sigur, at tað sær svart út í løtuni, tí marknaðarútlitini eru ikki góð.

– Tað sær ikki út til, at gongd kemur á aftur búskapirnar í okkara marknaðarlondunum. Samstundis er framleiðslan í Føroyum dýrkað, og sostatt er kappingarførið versnað.

Hvat tað endar við, hevur Árni Arge ikki so greitt boð uppá í løtuni.

– Eg vænti, at tey, sum arbeiða í vinnuni, fara at fáa tað verri. Men um tað hendir, at virki fara av lata aftur, veit hann ikki.

– Eg haldi, at tað veldst í stóran mun um, hvussu væl tað ber til hjá virkjunum at føra eykakostnaðin av lønarhækkinginmi yvir á skipini.

Tað, hann hugsar um, er um tað ber til hjá virkjunum at trýsta avreiðingarprísin niður fyri at viga upp ímóti teimum hækkandi lønarútreiðslunum.

Sostatt metir hann, at tað verða skipini og manningarnar, sum koma at bera prísin fyri at lønirnar á landi hækka.

– Virkini hava ikki annað val. Marknaðarprísin hava virkini als onga ávirkan á og hartil er marknaðurin versnandi. Men virkini hava sítt at forvara og tí mugu tey fáa útreiðslurnar niður og tað kunnu tey gera við at fáa avreiðingarprísin at lækka.

Í hvønn mun tað fer at føra við sær, at meiri fiskur verður avreiddur uttanlands, veit hann ikki.

–Tað er eitt einfalt roknistykki, men verður tað ein avleiðing, hevði tað ikki verið annað enn natúrligt, leggur Árni Arge afturat.

# Russarar aftur í Vági

**Frystigoymslan í Vági hevur gjørt avtalur við russarar um at goyma fisk**

ARBEIÐI
*Áki Bertholdsen*

**Vágur:** Nú er líkt til at tað aftur verður meiri at gera í sambandi við frystigoymsluna í Vági.

Har hevur annars lítið verið at gjørt seinastu tíðina. Fyrrverandi Heygadrangur, sum legði nógv upp í Vági, varð seldur til Íslands og síðani hevur verið meiri deydligt.

Men nú hevur Johan Dahl gjørt avtalu við russiska útgerðarfelagið Murmansk Trawlfleet um at goyma fisk fyri teir.

– Tað hevur verið striltið at fáa gongd á aftur, men nú bendir á, at tað hevur eydnast, sigur hann.

Hann sigur, at avtalan við russarar er fyribils í eitt hálvt ár, men so skal hon endurskoðast á nýggjárunum.

Í júst nú er ein russari í Vági við 3000 tonsum av svartkjafti á frystigoymsluna.

Johan Dahl sigur, at innan ein mánað, er aftur ein russari væntandi á Vág við eini last av kongafiski.

Hann sigur, at verkfallið gjørdi, at teir mistu 4.000 tons av russkiskum fiski, sum russarnir ístaðin fluttu heim.

– Hevði tað ikki verið, var frystigoymslan full nú, sigur Johan Dahl.

Hann væntar, at russisku skipini fara at geva minst líka nógv arbeiði á frystigoymsluni sum var frammanundan, men tað er ilt at siga enn.